Álit

í

løgtingsmáli nr. 55/2022: Uppskot til løgtingslóg um bókasøvn (Bókasavnslógin)

Sirið Stenberg, landsstýrismaður í almanna- og mentamálum, hevur lagt málið fram 7. mars 2023, og eftir 1. viðgerð tann 16. mars 2023 er tað beint Mentanarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 23. mars, 29. mars, 21. apríl og 26. apríl 2023.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við Orðblindalærarafelagið, Bókavarðafelagið, Kommunufelagið, Lærarafelagið, landsstýrismannin í barna- og útbúgvingarmálum og landsstýrismannin í almanna- og mentamálum saman við Landsbókasavninum.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Sólvit E. Nolsø, Jóhannis Joensen, Liljan Weihe, Súsanna Bertholdsen og Erling Eidesgaard) hevur hesar viðmerkingar:

Meirlutin fegnast serliga um, at við uppskotinum verður útbreiðslan av ljóðbókum víðkað. Alt fleiri brúka ljóðbøkur, og tí eiga bókasøvn at tryggja, at útbreiðslan er nøktandi. Tí tekur meirilutin undir við, at §24 í lógini, útgáva av ljóðbókum til almenningin, kemur í gildi dagin eftir, at lógin er kunngjørd.

Undir viðgerðini hevur nevndin millum annað umrøtt kravið um útbúgvingarligu førleikarnar, sum frameftir verða kravdir av starvsfólkum á fólkabókasøvnum. Serliga varð hugsað um førini, har skúla- og fólkabókasøvn vóru saman, og um broytingin hevði við sær, at tað fór at verða kravt av bókasøvnum, sum ikki høvdu fólk í starvi við hægri útbúgving, at seta fólk í starv, ið liva upp til útbúgvingarligu krøvini.

Tað verður tað ikki, men bókasøvn, sum ikki hava fólk í starvi við hægri útbúgving, skulu í framtíðini samstarva við bókasøvn, sum hava fólk við hægri bóksasavnsfakligari útbúgving ella bókavarðaútbúgving í starvi.

Føroya Lærarafelag vísti á, at tey sakna eina bókavarðaútbúgving í Føroyum, og at henda ikki hevur verið tøk í eini 20 ár. Meirilutin er samdur við Føroya Lærarafelag í tí og umrøddi eisini spurningin við Djóna Nolsøe Joensen, landsstýrismann í barna- og útbúgvingarmálum, sum upplýsti fyri nevndini, at arbeiðið at skipa útbúgvingina er í gongd.

Nevndin hevur eisini umrøtt stuðulsskipanina í uppskotinum. Í verandi lóg verður ein rakstrarstuðul latin kommunum, sum í løtuni er býttur millum 18 bókasøvn, og upphæddin er smábýtt. Stuðulin verður latin av góðkendari fíggjarætlan fyri næsta rakstrarár. Ført hevur verið fram, at umsitingin av stuðlinum er tung í mun til, hvussu nógv fæst burturúr.

Uppskotið leggur upp til, at rakstrarstuðulin verður umlagdur til ein verkætlanarstuðul, sum kann nýtast til menning av fólkabókasøvnum. Landsstýrismanninum verður heimilað at áseta neyvari treytir fyri stuðlinum.

Almanna- og mentamálaráðið og Kommunufelagið samráðast um, hvør leistur er bestur at brúka í útlutanini av stuðulsupphæddini, men Kommunufelagið vísti á, at tey ikki tóku undir við verandi

orðing í §10 um at leggja stuðulin um til ein verkætlanarstuðul, sum søkjast kundi um. Sambært Kommunufelagnum kundi tað millum annað havt við sær, at nøkur fá bókasøvn fóru við allari játtanini, og tey halda, at tíð og umsiting má eisini setast av til umsóknirnar.

Meirilutin er komin til ta niðurstøðu, at orðið *verkætlanarstuðul* er ov avmarkandi, serliga tá hugsað verður um, at aðalráðið og Kommunufelagið framvegis samráðast um lykilin at býta pengarnar út eftir, og at fleiri loysnir rúmast í orðinum *stuðul*.

Meirilutin setir tískil fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

§ 10, stk. 1, 2. pkt. verður strikað.

Viðmerkingar:

Við hesari broyting verður orðingin ”Stuðulin verður játtaður sum verkætlanarstuðul” strikað. Stuðulin, ið er nevndur í stk. 1, verður tí ikki avmarkaður til verkætlanir.

Jóhannis Joensen hevur hesar viðmerkingar:

Rættast hevði verið at strikað orðið "hægri" í § 7 í lógini. Soleiðis at tað stóð, at kravt eigur at verða, at starvsfólk við bókasavnsfakligari útbúgving ella bókavørðar eiga at virka á fólkabókasøvnum. Annars taki eg undir við meirilutanum í nevndini.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Bárður á Lakjuni og Magnus Rasmussen) hevur hesar viðmerkingar:

Minnilutin tekur undir við endamálinum við lógaruppskotinum, sum er at fáa lógarverkið á bókasavnsøkinum dagført, tí galdandi bókasavnslóg á fleiri økjum ikki er nøktandi. Samfelagið hevur á fleiri økjum verið fyri stórum broytingum. Internetið og talgildingin hava havt við sær stórar broytingar, ið eiga at síggjast aftur á bókasavnsøkinum. Her verður serliga hugsað um atgongd til føroyskar ljóðbøkur á netinum, men eisini um varðveiting og avhending av talgildum uppgávum.

Men minnilutin er av tí áskoðan, at nakrir partar í uppskotinum ikki eru gagnligir og mælir tí Løgtinginum til ikki at samtykkja uppskotið í verandi líki. Rættari hevði verið at gjørt nakrar broytingar, sum vístar verða niðanfyri og so komið í tingið á ólavsøku við broytta uppskotinum.

Minnilutin heldur, at tað eru serlig trý viðurskifti, sum eiga at verða broytt í uppskotinum og tey eru:

- **Ábyrgdarbýti millum land og kommunu.** Sum støðan er í dag, so fíggja kommunurnar umleið 85% av samlaðu rakstrarútreiðslunum, meðan landið fíggjar umleið 15%. Kommunurnar ynskja at taka fulla ábyrgd av bókasavnsøkinum og tað eiga tær at sleppa. Landsstýrið eigur at bera so í bandi, at avtala fæst við kommunurnar um, hvussu hetta kundi verið skipað.

- **Krøv til útbúgving.** Í uppskotinum verður í §7 skrivað, at fólkabókasøvn skulu hava starvsfólk við hægri bókasavnsfakligari útbúgving ella bókavarðaútbúgving í starvi. Lagt verður upp til, at um eitt fólkabókasavn einki starvsfólk hevur við hægri bókasavnsfakligari útbúgving ella bókavarðaútbúgving, skulu gera avtalu við aðra kommunu um at veita fólkabókasavnstænastu. Fólkabókasavnið, ið avtala verður gjørd við, skal hava starvsfólk við hægri bókasavnsfakligari útbúgvning ella bókavarðaútbúgving í starvi.
  Fólkabókasavn og skúlabókasavn er í nógvum, kanska flestu førum í sama høli. Skúlabókavørðurin er væl skikkaður til hesa uppgávu og tí átti møguleikin hjá starvsfólki við skúlavarðaútbúgving eisini at verið nevndur sum ein møguleiki.

- **Skúlabókasøvn.** Í §11 stendur, at skúlabókasøvn skulu vera í øllum skúlum, men í stk. 3 verður nevndur møguleiki, at skúlabókasøvn kunnu verða skipað saman við einum fólkabókasavni ella einum skúlabókasavni í einum øðrum skúla. Sera týdningarmikið er, at skúlabókasavn er á hvørjum skúla, og tí átti stk. 3 í §11 at verðið strikað.

Við hesum viðmerkingum tekur minnilutin ikki undir við málinum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

Mentanarnevndin, 2. mai 2023

Sólvit E. Nolsø formaður	Jóhannis Joensen næstformaður	Erling Eidesgaard
Magnus Rasmussen	Liljan Weihe	Súsanna Bertholdsen
	Bárður á Lakjuni	